TEORISKEIÐ
TIL PERSÓNBIL

Nýtt skeið til persónbil byrjar:
Hósdagin kl. 18.00 á Slættanesgøtu 5, Tórshavn

HAMMERS
KOYRISKÚLI
v/Johannus Hammer · Tel 573 940

Hús í Vági til sølu

Matr. nr. 0181A

Eldri hús (49 fermetrar) beint oman fyri keiina, mitt í Vági, til sølu til hægstbjóðandi.

Húsini eru í ringum standi og krevja ábøtur.

Tlf. 214226

KUNNGERÐ

Frá útskiftingarnevndini á Syðradali

Útskiftingin uttangarðs av Syðradals bygd varð endað við úrskurði sagdur á fundi á Syðradali 17. september 2004. Hesin úrskurður varð latin til ákæru frá sama degi sbrt. kap. 9 í útskiftingarlógini frá 27. mars 1939.

Møguligar kærur skulu vera skrivligar og stílast til Yvirútskiftingarnevndina, Sorinskrivarin, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn. Kærufreistin er 3 mánaðir frá 17. september 2004.

Útskiftingarskjølini liggja frammi hjá kommununi á Húsum og á Matrikulstovuni í Tórshavn, til kærufreistin er úti.

Víst verður eisini til heimasíðuna hjá Matrikulstovuni www.matrikul.fo

Øssur Á. Midjord
útsk.form.

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Kommunuval 2004

Vísandi til § 3, stk 2, í løgtingslóg um val til allar føroyskar kommunur, verður við hesum lýst at:

1. Kommunuval verður týsdagin 9. november 2004
2. Valevnislistar skulu latast valnevndarformanninum í avvarðandi kommunu ella kommununi
3. Valevnislistarnir mugu vera valnevndarformanninum ella kommununi í hendi í seinasta lagi týsdagin 19. oktober kl. 18.00

Hetta verður gjørt kunnugt

Jógvan við Keldu
landsstýrismaður

Landssjúkrahúsið
FO 100 Tórshavn

Deildarleiðari til E3/E2

Starvið sum deildarleiðari á E3/E2 á Landssjúkrahúsinum er leyst at søkja til setan 1. november 2004 ella eftir avtalu. Talan er um heiltíðarstarv.

E3 er ein medisinsk deild, við 9 seingjaplássum. Sergreinin á deildini er uppvenjing av sjúklingum við apopleksia cerebri og við dis. sclerosu. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við røktarstarvsfólk, fysioterapeutar, ergoterapeutar og talupædagog. Dentur verður lagdur á gott samstarv við avvarðandi og við primertænastuna.

E2 er ein røktardeild við plássi fyri 10 eldri búfólkum. Vit ynskja starvsfelagar við huga og hegni til at taka sær av eldri fólki. Dentur verður lagdur á góðan moral, etisk virði, positiva menniskjaáskoðan og góð samstarvsevni.

Krøv til umsøkjaran
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
- royndir og hug til leiðslu
- prógv innan leiðslu. Sjúkrarøktarfrøðingar, sum hava ætlanir um viðariútbúgving, kunnu eisini søkja
- hollar royndir og fakligan áhuga innan sjúkrarøktina
- áhuga og royndir fyri fakligari starvsfólkamenning á deild
- hava ætlanir um frálæru og góðskumenning av starvsfólkunum
- verða sjálvstøðug/ur, kreativ/ur og hava visiónir

Vit kunnu bjóða
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu (introduktión)

Starvslýsing, og meira fæst at vita um starvið við at ringja tlf 304500 til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102,
e-post asap@lsh.fo

Setanartreytir:
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 14. oktober 2004 kl. 12.00.

Skivlig umsókn, merkt "umsókn til starv", við avriti av prógvum, CV, autorisation og viðmælum e.l. skulu sendast til

Landssjúkrahúsið
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"

Sosialurin -har tað hendir

Leirvíkar skúli

Søkt verður eftir lærara at undirvísa 14 tímar um vikuna frá 15. oktober og skúlaáriið út.

Lærugreinarnar eru føroyskt og handaverk og list í 3. flokki, ítróttur í 5.–7. flokki dreingir, og svimjing 1. og 3. flokkur gentur, og svimjing 1. og 3. flokkur dreingir.

Starvið er vegna lærara við niðursettum tímatali.

Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

Meira fæst at vita um størvini hjá fyrstalærarannum á telefon 443234, 743234 ella 443379.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi hósdagin 30. september kl. 18.00, 2004.

Leirvíkar skúlastýri
v/ Unn Justinussen
tlf. 443065
530 Leirvík

Keyp av seyðaskinnum

Sjálvt um skinnaprísurin í ár er í botni frá okkara keyparum, keypa vit aftur í ár seyðaskinn, men bert um hesi eru saltaði og iligin.

Prísurin verður:
Fyri 1. flokks seyðaskinn kr. 17,50
Fyri 2. flokks seyðaskinn kr. 13,-

Hagreiðing skal verða eftir forskriftunum, og skulu skinnini m.a. kølast beinanvegin.

Bert væl hagreidd lambs-, ær- og veðraskinn fáa hægra prísin.

Pesjur verða ikki keyptar.

Tikið verður móti skinnum á MBM-Fóður frá 25. oktober til 10. desember.

Forskriftir um hagreiðing av seyðaskinnum kunnu fáast við at venda sær til MBM á telefon 47 90 35.

Kollafjørður 24-09-2004

MBM

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

TOYOTA CARINA AT 171
Árg. 1989, í góðum standi, til sølu fyri 13.000 kr.
Tlf. 508396

OPEL ASTRA 1.6
Árg 13.06.01. Sera vælhildin, koyrt 58.000 km. Hevur aircon og píkadekk eyka.
Tlf. 213925

SLEIPIKRÓKUR
v/ tilhoyri. til Ford Escort sedan frá 1996 til sølu.
Tlf. 721698

TIL BMW
Nógvir deilir til 3000 seriuna. Leðursetur, sportfelgur, hurðar, rútar o.m.a. til sølu.
Tlf. 445065 ella 223802

YNSKIST TIL KEYPS
Toyota Corolla XL 1300, árg. 87, ynskist til keyps bíliga sum eykalutir.
Tlf. 261179

TIL SØLU
Mitsubishi Pajero 2,5 TD, árg. 88, í góðum standi til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 210184

MAZDA 323 GT TIL SØLU
Árg. 89, 17'' sportfelgur, motorur nýrenoveraður, penur í lakkinum, tuningútstoyt, sportsetur, super anlegg.
Tlf. 227510

FORD MONDEO ST
Við skaða, bíliga til sølu. Koyrt 90.000 km.
Tlf. 316204 ella 254663

MERCEDES STATIONC. 300 TD
Koyrt 100.000 km. Árg. 78, í besta standi. Sýnaður 04. Prísuppskot 20.000 kr.
Tlf. 314641 ella 503938

VW PASSAT
Diesel, st. car, árg. 97. Nógvir slitlutir eru skiftir. Hevur nógva eyka útgerð, s.s. sportfelgur, justerbært sænknings sett, spoilara v.m. Hevur koyrt 238.000 km. Prísur fyrr 130.000, nú einans 100.000 kr. Bilurin sæst á bil.fo.
Tlf. 442084 ella 221362

YNSKIST TIL KEYPS
Differentiali til Mitsubishi Pajero, árg. uml. 1990.
Tlf. 584012

KIA SEPHIA
árg. 97, til sølu fyri sámuligan prís. Vinarliga ring á
Tlf. 582627

KABURATORUR
og tendring til Honda Civic 1.5 LSI, til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 224910

SPORTFELGUR
4x100 við dekkum, 15'', 195/50-15. Passa til Audi, Honda, Opel, VW, Mazda, Daiwoo og Toyota, til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 224910

TIL SØLU
Mitsubitshi Galant GLS Turbo diesel, árg. nov. 1990, koyrt 237953 km. Í góðum standi.
Tlf. 456277 ella 226844

PÍKADEKK TIL SØLU
4 píkadekk á felgum til Peugeot 307 fyri 2.000 kr.
Tlf. 333299 ella 333399

SUZUKI ALTO
Suzuki Alto frá 1999 til sølu. Nýsýnaður 13.09.04. Koyrt uml. 89.000 km. Við CD-spælara. Nýggj heilársdekk undir bilinum. Prísur: 42.000 kr. Ring
Tlf. 250118 ella 310055

KIA CARNVAL TIL SØLU
Silvurgráur Kia Carnival 2,9 TDI árg. 05.03 til sølu vegna keyp av minni bíli. Prísuppskot kr. 175.000,- Nýprísur kr. 267.000,-
Tlf. 333383 ella 258496

MAZDA 626 1,8
Árg. 89 kam. 220.000 til sølu fyri 12.000 kr.
Tlf. 457746

GER KVETTI
Ein Volvo DL til sølu. Sýnaður mars 04, er í góðum standi og sær gott út innan og uttan. Radio, disksp. fylgja við. Kr. 8.000.
263452

FORD FIESTA 1.3
3 dørs, árg. 1995, sælges som reservedele til højeste bud. Bilen har bl.a. en ny bensintank.
Tlf. 517117

OPEL VECTRA 2.0 TD
Til sølu um hóskandi boð fæst. Bilurin hevur el-rútar, el-spegl, 17'' felgur og eyka felgur við heilársdekkum og tokulyktum.
Tlf. 777211 ella 508288

4 NÝGGJ PÍKADEKK
Á felgum 185/65-14. Felgurnar passa til Toyota Carina o.o.m. kr. 2.000.
Tlf. 211010

TIL SØLU
Toyota Corolla 1.3 L, árg. 1997, svartur. Nýggj píkadekk fylgja við. Bilurin er til sølu fyri 55.000 kr.
Ringi tlf. 447310

FORD FIESTA 1.3 TIL SØLU
Árg. 2000, koyrt 72.000 km. Herav 60.000 km í Danmark. Rustviðgjørdur í 2002. Væl viðfarin, góð dekk, píkadekk kunnu fylgja við.
Tlf. 448894 ella 218894

TOYOTA AVENSIS 1.8 SOL
Við el-rútum og -speglum, í góðum standi. Árg. 01.99. Koyrt 102.000 km. til sølu.
Tlf. 333146 ella 251825

TIL SØLU
Opel Vectra 2.0 DTH, árg. 98 til sølu fyri 75.000. Ring
Tlf. 448509 ella 260916

NISSAN SUNNY COUPÉ GTI 1.6
Árg. 88, til sølu, sum eykalutir.
Tlf. 281296

TOYOTA CARINA II XLI
til sølu fyri 15.000 kr. Árg. 1991. Km. 221.000. Sýnaður apr. 2004. Ring
Tlf. 210365

TIL SØLU
Ford Escort stationvognur og Daihatsu Charmant til sølu sum eykalutir.
Tlf. 310352

NISSAN BLUEBIRD 2.0
Árg. 85, til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 260956 ella 269182

TIL SØLU
Mercedes 190 D, árg. 1987. Krevur ábøtur.
Tlf. 447391

EIN VOLVO 440 1.8
Árg. 1990, sýnaður í mei 2004, til sølu fyri 14.000 kr. Litur: Hvítur. 5 hurðar, søltak, el-spegl, el-rútar framman.
Tlf. 752067

TOYOTA LANDCRUISER
til sølu. Hevur ongar plátur, men koyrir.
Tlf. 212710

TIL SØLU
Fiat Brava 1,6 árg 97. Er í sera góðum standi. Ring á
Tlf. 220405 ella 350519

TOYOTA COROLLA
Ein Toyota Corolla 1.8 diesel, árg. '89, sýnaður í apríl, í góðum standi við vetrardekkum og summardekkum, til sølu fyri 16.900. Ringið
Tlf. 260813

TIL SØLU
Manglar tú píkadekk til veturin? Dekk til Ford, bara brúkt nakrar fáar ferðir. Siggja út sum nýggj. Stødd 175/70 R13, til sølu fyri 2.800 kr. Nýggj kosta 885 kr. pr. stk.
Tlf. 229933

FORD ESCORT 16I
Ljósabláur, bensin, árg. 95, til sølu. Hevur koyrt 130.000 km. Bilurin er í góðum standi. Verður seldur um nóg gott boð fæst. Ring
Tlf. 253397 eftir kl 18

OPEL CALIBRA TURBO
2.0 turbo. 204 HK, 4x4, hevur koyrt 145.000 km. Árg. 11/93. 0-100 km 6,7 sek. Toppferð 250 km. Sýnaður 09/2004. Sproytaður 10/2003. Komplett leður kabina. Bilurin sæst á
bil.fo

5 HEILÁRSDEKK Á ALUFELGUM
15'', stødd 195/55-15, til sølu fyri 1.200 kr. Lítið brúkt.
Tlf. 227045

GERI KVETTI
Vegna flyting er ein Volvo 240 GL til sølu fyri 10.000 kr. ella hægst bjóðandi. Sýnaður í mars 2004. Sær sera gott út inna og uttan. Ongin rustur.
Tlf. 263452

CHARADE TIL SØLU
Daihatsu Charade, árg. 09/89 til sølu fyri 7.000 kr. Sýnaður juli 2004. Ring
Tlf. 271495

16'' FELGUR
5 hol, passa t.d. til Passat, fyri einans 1.200 kr.
Tlf. 722018

TOYOTA LANDCRUISER 4 x 4
bíliga til sølu. Nógvir góðir lutir.
Tlf. 505010

SAAB 9-3 2.0i T
árg. 03. sept. 14.000 km, jubileumsmodel, myrkabláur, svart leður innan, auto aricon, 16'' alufelgur. Nýprísur 285.000 kr. Til sølu fyri 235.000 kr. Er til sølu vegna flyting.
Tlf. 212101 ella 373373

Amboð

EL-GAFFILTRUKKUR
til sølu. Linde 2,5 T, er sum nýggjur, árg. 97. Batt. árg. 2001. Hevur lága stammu og frilift.
Tlf. 421372 ella 721372

TIL SØLU
Plattavognur til sølu.
Tlf. 224910

TIL SØLU
Stoypiformar til sølu.
Tlf. 592771

TIL SØLU
Flettingarborð til sølu fyri 1.200 stk.
Tlf. 222386

TIL KEYPS
Er tað nakar ið hevur eina góða bindimaskinu at lata/selja okkum?
Tilhaldið í Tórsgøtu, tlf. 316491

BRÚKTUR ARBEIÐSSKÚRUR
20' containari, sum er innrættaður sum skúrur, til sølu.
Kaj Andreasen & Co, tlf. 315600

VIÐFESTIVOGNUR
Tredal vognur við spiralfjaðrum til sølu. Kann sígjjast á heimasíðu www.tredal.no.
Tlf. 218101, Todal-Velbastað

Arbeiði

ARBEIÐI YNSKIST
Dugnaligur 21 ára gamal maður við koyrikorti A B C D DE CE DE tørvar koyriarbeiði. Jú størri akfar, jú betur. Alt hevur áhuga. Ring á
Tlf. 503593 Danny

FLISEARBEJDE
Pensionist søger indendørs flisearbejde.
Tlf. 228058 el. 314434

PLÁTUSMIÐIR
Til Svorikis at arbeiða? Ringi og fræetti meira
Tlf. +46 762355666

REINGERINGSARBEIÐI
ynskist, helst privat. Hevur hetta tín áhuga, so ring
Tlf. 311361 ella 221381

GRÓTGARÐAR VERÐA LAÐAÐIR
Úr haga- og suðuroyargróti. Ringi og fái eitt tilboð á
Tlf. 721168

ER TAÐ NAKAR
Sum manglar ein lastbilasjafør, so ring
Tlf. 228867

VI ER EN
dejlig familie i Island. Vi er mor, 2 store piger og 2 friske drenge på knapt 2 og 4 år. Vi søger en sød barneglad pige, atten år eller ældre til at hjælpe os med det huslige og de 2 små drenge. Vi glæder os at høre fra dig. Med venlig hilsen Margret.
Tlf. +354 6615723, e-mail: cmargret@hotmail.com

ALT TIMBUR
og snikkaraarbeiði verður gjørt, stórt sum smátt, biligt og gott.
J.P.TræsmiðTlf. 583444

Barnaútgerð

BIL STÓLUR
Góðkendur bilstólur 0-13 kg. av merkinum »Brevi« til sølu. Nýprísur 1.600 kr. Til sølu fyri 800 kr. Ring
310036 ella 264541

BABYLIFT
Blá Simo babylift við madrassum til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 457368 ella 271761

YMISKT TIL SØLU
Ein bilstólur 0-13 kg. Hevur skjól yvir høvdið á barninum, 300 kr. Ein bilstólur 9-18 kg. 200 kr. Beriseli og baðikar til sølu fyri ávikavist 150 og 100 kr. Ringi
Tlf. 216680 ella 313830

TVÍBURÐA-KOMBIVOGNUR
Svart/hvítur Basson kombi duo v/ lufthjólum til sølu. Flugunet, regnslag og ein lift v/madrassu fylgja við. Er brúktur sum systkinavognur. Er í góðum standi, til sølu fyri 3.500 kr.
Tlf. 216680 ella 313830

MANGLAR TÆR EIN VOGN
Vælhildin myrkabláur Simo kombivognur við reg. handtaki til sølu. Lift v/ madrassu fluguneti, regnslagi og soviposa fylgja við. Til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 216680 ella 313830

MYRKAGRØNUR ODDER BARNAVOGNUR
til sølu. Nýttur til eitt barn. Kurv, madrassa, koddi og dýna fylgja við.
Tlf. 509550

SIMO-KOYRISTÓLUR
við posa, puslitasku, regnslagi, parasol, selum, fluguneti og handlineti. Keyptur fyri 6.475. kr., selist fyri 3.000 kr.
Tlf. 455872 ella 224499

TIL SØLU
Gult sett við vesisetur, skamli og hoved/halefad, 200 kr. Bilstólur 0–13 kg við galesju og regnslagi, 300 kr. Bilstólur 0–18 kg., 250 kr.
Tlf. 455872 ella 224499

TIL SØLU
Himmal, seingjarrond, junior seingjasett og himmalpinnur, selist samla fyri 500 kr. Er ráhvítt við bamsum broderað á himmalin og seingjasettinum.
Tlf. 455872 ella 224499

YNSKIST
Barnavognur ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 222734 ella 447783

BILSTÓLUR YNSKIST
til keyps. Stødd frá 13 kg. Skal vera góðkendur.
Tlf. 313704 ella 311420

BILSTÓLUR
Til barn upp til 18 kg. til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 517542

Bátaútgerð

VÆLÚTGJØRDUR 28 FÓT SCANIA PLAST
Glastrevjabátur við fiskiloyvi til sølu.
Tlf. 371563 ella 211563

SEIGUR 1000
Spildurnýggjur Siegur 1000, uttan fiskiloyvi, nóg stórur til at fáa bankaloyvi. Motorur Volvo D9 500 HK. Kann leverast í apríl 2005. www.batur.fo
Tlf. 228741 ella 218292

MAN MOTORUR
Bíliga til sølu. Áhugaði ringið
Tlf. 216126

ARAMIS 30 FÓT
av tí stóra slagnum við nýggjum 200 HK Volvo motori, fiskiloyvi, 5 DNG íslandssnellum, íslandsrullum og allari nautiskari útgerð til sølu. Ring
Tlf. 586003

TIL SØLU
Ein 15 fót segljolla av slagnum »Nordborg Jolle«. Eitt sett av seglum við spílkara, vogni og elhátalara fylgja við. Prísur 10.000 kr.
Tlf. 210355

LÍNUSPÆL
Oljutryst línuspæl til sølu. Ringi
Tlf. 311690 ella 218690

SPEEDBÁTUR
Opin speedbátur uttan motor. Vognur fylgir við, til sølu fyri 12.000 kr.
Tlf. 213195

MOTORUR
Nýggjur Volvo Tamd 74 EDC, 430 HK 2500 u/min. Gear: Typa ZF 301.
Tlf. 226535

BÁTUR TIL SØLU
Myra 27 við allari útgerð og fiskiloyvi, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 584403

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:.....
Bústaður:.....
Bygd/býur:.....
Tlf.: .....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki